## Norðskála/Oyrar skúli

Søkt verður eftir lærara skúlaárið 2002/2003 fyri lærara, sum hevur farloyvi.

Starvið, sum er fulltíðarstarv, er tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/2003, og verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, tlf. 422245 ella 422208.

Umsóknir, við møguligum prógvum og viðmælum, skulu vera Skúlastýrinum í Sunda kommunu í hendi í seinasta lagi hósdagin 13. juni 2002.

**Skúlastýrið í Sunda kommunu**
v/ Nomi Jacobsen
450 Norðskáli

## Vit sóknast eftir

**fólki til fast starv til handilin**

**Arbeiðstíðirnar eru hesar:**

kl. 06.00 – 13.00
kl. 13.00 – 19.00
kl. 19.00 – 23.30
Allar dagar í vikuni

Løn eftir S&K

**P/F Frants Restorff**
**Tórsgøta 13**
**Postsmoga 41**
**110 Tórshavn**
**Tlf. 311060**

frants restorff

## FA. GRAVSTEINAR

Velbastaðvegur 45
Box 336
110 Tórshavn

Tlf. 320370
Fax. 321470
Far. 214270

*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰*
*annars sambært avtalu.*

*Vøruskrá kann fáast!*

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**

## Maritim fyrireiking

**(10. floks støði)**

Um nóg nógv tekna seg, byrjar nýtt skeið í maritimari fyrireiking mánadagin 12. august 2002, kl. 10.00 og endar við próvtøku í desember 2002.

Lokið prógv gevur atgongd til víðari lestur á maskinmeistaraskúla og Sjómansskúlanum. Til ber at søkja útbúgvingarstuðul.

**Kostnaður:** kr. 1.200,–

**Tilmelding:**
**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**
Frútrøð 1 • postboks 353 • 110 Tórshavn
Tlf. 317755 • Telefax 318250

## Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** VW Golf 1.6 D – 3 hurðar
**Árg.:** 1987
**Km:** 167.238

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Magni Petersen, sýnsmaður
tlf. 34 57 28
fax nr. 34 56 07
e-mail: mpe@trygging.fo

At hitta mánadag-hósdag millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00.

## Handilslærlingur

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vit søkja eftir fólki til handil okkara, arbeiðsuppgávurnar koma at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring, bílegging av vørum og seinni egin ábyrgd av starvsøki, umframt aðrar uppgávur.

Er spurningur ella ivamál ringið til okkara á tlf. 315600

Umsókn ynskist til 1. juni 2002

*Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co. varð stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna, og útgerð til fiski- alivinnuna, skip og bátar*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Postboks 1200 · 110 Tórshavn

## MAN 8.150

**Lastvognur v. 3 vegis vippulast og krana 3,5 tons, árg. '91**

**Nýsýnaður til sølu fyri kr. 70.000 + MVG ella hægsta boð yvir.**

Henning Thomsen (y)
Grótlaðari Tlf. 316739 - 283639

## Fólk søkist

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til køk okkara. Arbeiðstíðin er uml. frá kl. 10-14 mánad.-fríggjadag.

**Keypmaðurin »úti í Grønlandi«**
**Johannes Andreasen P/F**
Grønlandsvegur 16
100 Tórshavn
Tlf. 312087

## Vit sóknast

eftir fólki at byrja skjótast gjørligt hjá Føroya Bjór í Havn.

Viðkomandi má hava koyrikort til lastbil. Arbeiðið umfatar m.a. søluarbeiði og útkoyring av vøru.

Løn eftir avtalu.

Føroya Bjór
**Føroya Bjór, avgreiðslan**
Akranesgøta 10
Tlf. 313434 ella 214334

## Til sølu

**SCANIA** trekkjari R142M6X2 390hk árg. 86.
Km 2.285.000 v/skaml.

**Kr. 70.000,-**

SCANIA **Fa. Johs. Berg**
Staravegur 1-3
100 Tórshavn
Tlf. 313535

## Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK · R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

## KUNNGERÐ

**frá útskiftingarnevndini**
**fyri Handastahaga í Sandavági**

Næsti útskiftingarfundur verður mikudagin 12. juni 2002 kl. 10 í Vakhúsi.

Nevndarlimir eru Jørleif Kúrberg, Tórshavn og Olaf í Garði Joensen, Eiði.

N.v.0

**MATRIKULSTOVAN**
Øssur A. Midjord
útsk. form.



# Vikuskifti

Nr. 102 • leygardagur • 1. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


Planting við einum endamáli

— Tað er neyðugt at fara strategiskt til verka, tá ein fer undir at planta urtagarðin, sigur røktarleiðarin hjá býráðnum í Havn, Michael Jacobæus



Lesið síðu 3



*Maureen og Christopher Clarke, avmyndað saman við brúðargentum og brúðarsveinum. Hendan myndin stendur í nýggjastu útgávuni av kenda blaðnum You & your wedding*

# Føroyskt, enskt og arabiskt brúðleyp

Føroysk, ensk og arabisk mentan eyðkendu brúðleypið hjá Maureen Djurhuus úr Havn og Christopher Clarke úr Onglandi seinasta summar í Suður-onglandi. Tí endaði brúðarmyndin í kenda blaðnum "You & your wedding", sum verður selt um allan heimin

BRÚÐLEYP
*Turið Kjølbro*

Eins og allar komandi brúðrar, keypti eisini Maureen Djurhuus, sum er ættað úr Porkeri, brúðarbløð fyri at fáa góð hugskot til brúðleyp sítt, sum var 21. juli í fjør í Suður-onglandi.

- Í hesum bløðum kann ein vinna brúðarferðir til Indiska Havið, ókeypis make-up viðgerð og annað. Eitt var, at ein kundi senda myndir inn av "serligum" brúðleypum. Vit hugsaðu, at hetta kundi verða stuttligt, so vit sendu okkara mynd inn í august síðsta ár, greiðir Maureen frá.

Maureen hoyrdi tó einki aftur, fyrr enn nú ein dagin.

- Knappliga nú ein dagin kemur ein genta rennandi til mín og sigur, at hon hevur sæð meg í einum brúðarblaði. Eg skilti ikki rættiliga, hvat hon meinti við, men so fall fimm oyraði. Ein brúðarmynd av mær og Christopher var í størsta brúðarblaðnum her í Onglandi.

Blaðið eitur "You and Your Wedding" og tað verður selt kring heimin. Myndin er undir yvirskriftini "The Viking Queen". Í greinini stendur skrivað, at Maureen kemur úr Føroyum, og á myndini eru eisini brúðargenturnar, OgSun úr Korea, Christina úr Onglandi og Elsa Durhuus úr Havn, allar í føroyskum búna og brúðarsveinarnir í enskum og skotskum búna. Eisini systkini hjá Maureen eru á myndini í føroyskum klæðum.

Brúðleypið varð hildið í einum stórum herskapshúsum. Til brúðleypsveitsluna vóru 142 fólk, sum er ógvuliga nógv eftir bretskum mátistokki. Úr Miðeystri vóru um tíggju gestir og úr Føroyum nógv av skyldfólkum og vinfólkum hjá Maureen. Úr Jordan hevði ein vinkona Maureen smákøkur við í skjáttuni, sum komu á borðið eftir dessertina.

- Danska brúðarvísan varð kvødd, skipað av skyldmanni mínum, Símuni Hansen, og allir gestirnir tóku lut. Gestirnir úr Miðeystri dansaðu arabiskan dans, so tað var ógvuliga stuttligt, sigur Maureen.

Í brúðleypum í Onglandi er siðurin tann, at bert tríggjar røður eru. Siðvenja er eisini, hvør heldur tær, og at fyrstan røðan er álvarsom, meðan hinar, ið koma aftaná, skulu verða stuttligari og stuttligari. Seinasti røðarin er " the bestman" og sum vera man krevjast góðar taligávur av honum. Hendan siðvenjan varð eisini hildin í brúðleypinum hjá Maureen og Christopher, tó vóru fimm røður. Vinkona Maureen, Elsa, helt eina røðu og sang ein vakran sang, og systkinabarn Maureen, Egil Olsen, segði somuleiðis nøkur orð vegna familjuna, sum ikki kom í brúðleyp.

Maureen, hvørs eftirnavn nú er Clarke, hevur ferðast stóran part av sínum vaksna lívi. Í longri tíð hevur hon arbeitt og búð í Miðeystri. Har møtti hon eisini manni sínum, Christopher, á málskúla í Amman í Jordan, har bæði lærdu arabiskt mál. Í løtuni eru tey stødd í Onglandi, har tey skulu verða í nakrar mánaðir. Í summar koma tey til Føroya at vitja. Síðani gongur leiðin til Norður Afrika at arbeiða.

- Eg fari at arbeiða sum sjúkrasystir innan kristilig vælgerandi arbeiði, meðan Christopher vantandi fer at arbeiða innan náttúruvísindi.